# Havstovan søkir eftir kokki




## Søkt verður eftir kokki til Jákup Sverra at byrja skjótast gjørligt.

**Lýsing av Jákup Sverra**
R/S Jákup Sverri
Tórshavn

Skipaslag: Havrannsóknarskip

Manningin telur millum 8 og 12 mans, alt eftir slag av túri. Harumframt eru altíð starvsfólk frá Havstovuni við umborð á kanningarferðunum.

Starvið fevnir um matgerð, proviantering, reingerð v.m.

Sum kokkur stendur tú fyri stórum parti av trivnaðinum umborð. Tað verður væntað at tú viðvirkar til at skapa eitt gott arbeiðsumhvørvi. Tí verður dentur lagdur á blíðskap, góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa.

### Setanartreytir

Starvið er lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Sjóvinnubræv sum kokkur krevst.

### Umsóknir

Skrivligar umsóknir við CV, avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi 13. mars 2022.

Umsóknirnar skulu sendast til:

**Havstovan**
**Nóatún 1**
**P.O. Box 3051**
**FO-110 Tórshavn**

**ella e-post: starv@hav.fo**

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Annfinn Hjelm, reiðara, á tlf. 35 39 00 ella teldupost: annfinnh@hav.fo

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE